## Vit eiga eisini at umhugsa evruna

Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevnd løgtingsins heldur, at vit eiga at umhugsa at skifta donsku krónuna um við evruna. Í Danmark tykist meiriluti vera fyri at skifta donsku krónuna um við evruna. Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri hevur latið upp fyri møguleikanum um atkvøðugreiðslu um at nýta evruna sum gjaldoyra ístaðin fyri donsku krónuna. Í hesum sambandi eiga vit eisini at umhugsa, at Føroyar tekur evruna sum gjaldoyra. - Fyri stabilitetin í samfelagnum er umráðandi hava sterkt gjaldoyra, tað hevur fíggjarkreppan seinasta vikurnar prógvað, sigur Anfinn Kallsberg, formaður í fíggjarnevndini. Rentan fyri evruna er 1,75% minni enn fyri donsku krónuna. Fyri eitt vanligt húsarhald, sum hevur tikið tvær milliaónir í sethúsaláni, svarar hettar til 2000 krónur minni í rentuútreiðslum um mánaðin eftir rentustuðul. Landskassin hevði tískil eisini goldið munandi minni í rentustuðli, umframt at rentubyrðan hjá vinnulívinum eisini hevði veri minni, heldur hann



# úlanum við Áir



*- Eg eri so glað, at eg havi ikki orð fyri tí. Nú kann eg fáa eina útbúgving, og tað hevði eg ongantíð droymt um, at eg nakrantíð fór at fáa, sigur ein ovurfegin Lív Poulsen, sum er ein rættilig sólskinssøga*

gav henni eykatímar, stuðlar, serlærarar, sálarfrøðingar og talupedagogar var lítil bati at hóma nakrastaðni.

Men Lív var ikki býtt. Hon var ein still og góð genta, sum kláraði seg væl sosialt og í fimleiki og í køki. Tað var bara hetta, at hon hevði ikki frið í sinninum at læra. Kortini hevur hon onki at seta á skúlan sum so, tí, sum hon sigur, tey royndu veruliga at hjálpa, men har rein millum lítið og onki við.

- Tað var serliga ringt, tá vit høvdu bólkaarbeiði, tí tá var tað altíð ein spurningur um, hvør bólkur nú skuldi dragast við meg, sigur Lív Poulsen, sum ofta ivaðist í, um hon í veruleikanum var menningartarnað.

### Millum tey bestu

Í skúlanum við Áir upplivdi Lív Poulsen fyri fyrstu ferð í skúlahøpi fullkomnan tryggleika, tíð og frið at læra.

- Her sleppur tú ikki at sita fyri onki. Lærararnir spyrja inn til tín og hava veruliga hjartað við í tilgongdini, sigur Lív Poulsen, sum í fjør tók 9. flokk og fekk bæði 10 og 11 tøl í prógvið. Í ár tekur hon FHS, sum er støðisár til Hægri Handilsskúla, har hon ætlar sær næsta ár.

- Eg skilji als ikki, at eg ikki havi lært nakað fyrr. Nú fellir tað mær so lætt, og eg eri ein av teimum bestu næmingunum í flokkinum, sigur Lív Poulsen, sum herfyri bleiv eitt sindur vónbrotin, tí hon "bara" fekk eitt 9 tal í støddfrøði.

Lív dugur óføra væl at orða seg, og hon forklárar, at millum næmingarnar er ein sunn kapping um at fáa bestu úrslitini. Og tey brúka nógva tíð til at hjálpa hvørjum øðrum, eisini aftan á skúlatíð.

- Her eru vit øll í sama bási, og tá er nógv lættari at læra, sigur hon.

### Fordómarnir fánaðu

Áðrenn Lív fór í skúlan við Áir hevði hon somu fordómar, sum nógv onnur helst eisini dragast við.

- Eg helt, at tey sum gingu her við Áir bara vóru sovorðin klikkað fólk, og eg vildi ikki setast í bás við tey, sigur hon. Men tíbetur yvirtalaði ein vinmaður hana, og nú, hon hevur gingið her í hálvtannað ár, veit hon, at hetta eru heilt vanlig fólk, sum av einari ella aðrari orsøk hava brúk fyri at verða umskúlað ella at fáa endurbúgving.

Lív er í øllum førum eitt skínandi dømi um eina unga kvinnu sum vendi vanlagnuni til vón.

## FAKTA

Roknað verður við, at fimti hvør føroyingur er lesi- og/ella skriviveikur. Sigast má, at hetta er eitt stórt brek í dagsins samfelag, har útbúgving og vitan hevur alstóran týdning fyri møguleikarnar at mennast

## Fáa nýggja byrjan við Áir

**Í Alv-skúlanum við Áir kunnu vaksin fólk taka 9. flokk og FHS, so tey fáa betri førleikar at koma víðari í lívinum**

ÚTBÚGVING
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Maibritt Holm Andersen, lærari, er leiðari fyri Alv-skúlan við Áir.

Vit spyrja hana, hvat tey gera øðrvísi enn fólkaskúlin.

- Vit brúka ikki øðrvísi frálæruhættir sum so. Men hjá okkum hava næmingarnir tíð og umstøður at fara í dýpdina, og vit taka støðið í einstaka næminginum, sigur hon.

### Persónlig menning

Eisini greiðir hon frá, at stórur partur av uppgávuni hjá skúlanum er at stuðla næmingunum persónliga, so teir fáa álit á seg sjálvar og førleikar sínar.

- Vit brúka nógv tíð uppá at fylgja við og at peppa næmingarnar upp, sigur Meibritt Holm Andersen, sum forklárar, at seinastu árini er talið av næmingum hækkað. Í løtuni ganga 33 næmingar í skúlanum.

Nútímans tøknin verður eisini í alt størri mun tikin við í undirvísingina. Eitt nú verður rættstavarin til telduna brúktur til næmingar, sum hava ilt við at stava.

### Vón í myrkrið

Meibritt Holm Andersen greiðir frá, at skúlin er fyri vaksin fólk, sum av einhvørjari orsøk hava tørv á at fáa endurútbúgving. Til dømis aftaná vanlukku ella av sosialum orsøkum.

Tað ber til at búgva á skúlanum. Næmingar, sum verða vístir til skúlan gjøgnum Almannastovuna, hava fyrsta rætt, men onnur kunnu eisini søkja inn á skúlan. Hesi fáa tá vanligan lestrarstuðul.